# Mugu hava nýggjar blokk-samráðingar


*Kristian Magnussen, løgtingsmaður*

**Tað er púra ábyrgdarleyst at lækka blokkin. Tað ber ikki til at geva vallyfti, sum vit ikki megna at gjalda, segði Kristian Magnussen, løgtingsmaður á landsfundi Javnaðarfloksins**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Vit noyðast at fáa nýggjar blokksamráðingar, um tey vallyfti, sum nú verða givin, skulu haldast. Og tað gerst ikki, um eingir pengar eru, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður.

Tað ber ikki til at halda tey lyfti, Javnaðarflokkurin nú leggur út við, um blokkurin minkar í tann mun, sum sitandi samgonga er í ferð við, vísir hann á.

Gongur tað, sum tað ger nú, er yvirskotið hjá landskassanum burtur komandi ár. Og so ber ikki til at halda nakað av teimum lyftum, givin verða.

– Tað er fullkomiliga ábyrgdarleyst, sum nú gongur fyri seg, sigur Kristian Magnussen. Íløgurnar vaksa, og verandi skipanir gerast nógv dýrari, enn roknað varð við. Fíggjarlógin fer at vaksa við 200 milliónum komandi ár, meðan blokkurin bara skal minkast.

– Tað ber als ikki til, og tí skulu vit krevja, at vit fáa nýggjar samráðingar um blokkstuðulin, tá vit koma aftur til valdið, sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður. Sitandi landsstýri ber seg fullkomiliga ábyrgdarleyst at við at biða um at minka blokkin.

Lyftini, Javnaðarflokkurin gevur nú, eru gjørd út frá tí, vit í dag hava ráð til. Men um gongdin ikki verður vend, hava vit ikki ráð til tey. Tí er tað lívsneyðugt at fáa nýggjar blokksamráðingar, sum hækka blokkin aftur til í minsta lagi tað, hann var, áðrenn hendan samgongan fór undir at beina fyri honum.

– Javnaðarflokkurin eigur at fara út við einum púra greiðum boðskapi, sum ikki letur fólk vera i iva um, at vit fara at gera, hvat vit kunnu, fyri at fáa hækkað blokkin aftur, segði Kristian Magnussen, løgtingsmaður á landsfundi Javnaðarfloksins í Vestmanna.

# Daprar framrokningar

**Javnaðarflokkurin hevur gjørt framrokningar, sum vísa, at longu í 2006 fer landskassin at hava hall í gjaldførinum**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Hóast landsstýrið dagliga sigur frá, hvussu væl stendur til fíggjarliga, vísa framrokningar, at tað fer rættiliga skjótt at ganga tann øvugta vegin.

Í landsfundarfrásøgn síni segði skrivari Javnaðarfloksins, Eyðólvur Dimon, at slíkar framrokningar, sum hesar, flokkurin hevur gjørt, eru beinleiðis krígsavbjóðing móti øllum teimum virðum, sum Javnaðarflokkurin stendur fyri. Gongdin fer rætt og slætt at gera, at vælferðarsamfelagið fer fyri einki.

Sitandi samgonga hevur einki sum helst gjørt fyri at tryggja landskassanum nakrar inntøkur av tí, sum tikið er frá borgaranum. Tað verður bara tosað um fullveldi, meðan borgarligi parturin av samgonguni ótarnaður rekur sín høgravenda politikk.

Tjóðveldisflokkurin, sum annars plagar at siga seg vera ein flokk, sum verjir tann meiniga mannin, hevur offrað alt fyri fullveldismálið, sum kortini ongan veg er komið, segði skrivarin í síni framløgu.

Hann vísti til tjóðveldismann, sum hevði sagt, at Tjóðveldisflokkurin fer ikki at ofra fullveldisætlanina fyri eina pensiónslóg.

Tá soleiðis er, er ikki annað at vænta enn, at borgarligur politikkur verður tann, sum stýrir samgongustevinum.

Javnaðarflokkurin hevur alla tíðina víst á ein alternativan politikk, hvørs tørvur gerst alt meira sjónligur, sum tíðin fer, segði skrivarin í síni framløgu.

Alt meðan samgongan hevur tosað um fullveldi og skerdan blokk, er vælferðarsamfelagið stillisliga við at fara fyri bakka.

Tí býður Javnaðarflokkurin seg fram til at steðga og venda rætta vegin til næsta val, segði Eyólvur Dimon, skrivari Javnaðarfloksins, tá hann legði skrivarfrágreiðingina fram á landsfundinum í Vestmanna fríggjakvøldið.


*Eyólvur Dimon, floksskrivari*

# Landsfundurin mintist tey farnu

**Landsfundur Javnaðarfloksins varð fríggjakvøldið settur í Vestmanna Skúla . Kvøldið byrjaði við mentanartiltaki, áðrenn frágreiðing skrivarans varð løgd fram og viðgjørd**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Fundurin bygjaði við, at Jóannes Eidesgaard, formaður, beyð vælkomin og takkaði fyrireikarunum og vónaði at fáa ein góðan landsfund, sum øll fingu nakað burturúr.

Fríggjadagurin 14. september varð av løgmanni lýstur almennur sorgardagur, og Jóannes Eidesgaard helt stutta røðu, har hann mintist tey, sum fórust av yvirgangsatsóknunum í USA týsdagin. Fundarfólkið reistist og mintist tey, sum fóru.

Jóannes Eidesgaard hevði eisini minningarorð um fyrrverandi løgmann og formann Javnaðarfloksins, Maritu Petersen, sum andaðist 25. august 60 ára gomul.

Síðan lat formaðurin orðið til fyreireikararnar, Norðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Thomas Arabo byrjaði við at minnast ein av trúgvu limum felagsins, Tummas Enok Hansen, sum andaðist fyrr í ár. Ein rættur javnaðarmaður, sum ongantíð lat nakran iva vera um, hvar hann stóð. Ein fyrimynd felagsins.

Eftir minningarorðini sang mannskór úr Vestmanna undir leiðslu av Kára Bæk sálmin »Stíg seggur oman Golgata«.

Landsfundurin helt síðan fram við mentanarløtu við sangi, tónleiki og upplestri av tekstum hjá Heðini Brú, sum hevði havt fylt 100 ár fyri stuttum.


*Manskór úr Vestmanna*

# Lakari úrslit enn í fjør

**Roknskapur Javnaðarfloksins vísti eitt úrslit, sum var góðar 130.000 krónur minni enn seinast**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Hóast Javnaðarflokkurin kundi leggja ein roknskap fyri landsfundin, sum vísti eitt avlop upp á knappliga hálvtannaðhundraðtúsund krónur, var tað heldur lakari enn í fjør.

Tann stóri parturin av inntøkum floksins er sambært roknskapinum løgtingsstuðulin til politiska upplýsing umframt fólkatingsstuðulin, sum flokkurin fær fyri at hava mann valdan á Fólkating.

Hinvegin er stóri parturin á útreiðslusíðuni skrivstovuútreiðslur, fundir skeið og tílíkt.

Onkrar viðmerkingar vóru til roknskapin, sum skrivarin svaraði. Millum annað kom fram, at íroknað rímiliga stórar skrivstovuútreiðslur var millum annað húsaleiga fyri hølini, Javnaðarflokkurin leigar á Áarvegnum í Havn.

Tað varð av onkrum fundarfólki hildið vera ein heldur løgin skrivstovuútreiðsla, men varð kortini góðtikin, tí tveir góðkendir grannskoðarar høvdu skrivað undir.

Eftir onkrar smávegis viðmerkingar, varð atkvøtt um roknskapin, sum varð góðkendur.


*Fundarluttakarar*



# Javnaðarflokkurin nýggja valskrá


*Landsfundur í Vestmanna*

**Javnaðarflokkurin byrjaði rættiliga valstríðið á landsfundinum, sum hildin varð í Vestmanna um vikuskiftið. Nýggj valskrá í 20 punktum varð løgd fram. Sosialmálini standa ovast**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Mál sum eldrarøkt og pensiónir standa allarovast í nýggju valskránni hjá Javnaðarflokkinum, sum formaðurin legði fram á landsfundinum í Vestmanna leygarmorgunin.

Síðan verða viðgjørd mál sum skúlaviðurskifti, fiskivinna, mentan, skattamál, útjaðarpolitikkur, oljuvinna, umhvørvi og sjálvstýrislóg. Skilliga sæst, at gomlu sosialdemokratisku málini verða sett í hásæti.

Ítøkiliga verður skotið upp, at komandi fýra árini skulu 160 ellis- og røktarheimspláss fáast afturat á ellis- og røktarheimunum kring landið.

Hetta er ikki meira enn bráfeingistørvurin er í dag, sigur Javnaðarflokkurin í nýggju valskránni.

Tað fer at kosta landskassanum 80 milliónir krónur í fýra ár at fáa hesi røktarplássini. Kommunurnar eiga at fáa trygd fyri, at landakassans partur av hesi upphædd verður goldin.

## Hækkað fólkapensión

Um fólkapensiónina sigur nýggja valskrá Javnaðarfloksins, at hon skal hækkast til kr .10.000,- fyri stakar fólkapensionistar, meðan hjún skulu fáa 16.000, - krónur um mánaðan í fólkapensión.

Hesi tøl eru grundað á hækkaðar upphæddir av eitt nú løntakara- og arbeiðsgevaragjøldum og ikki minst Samhaldsfasta, sum er eitt hjartabarn Javnaðarfloksins.

Um heimarøktina verður sagt í valskránni, at hon eigur at verða bygd út við eini døgnrøktarskipan.

Mett verður ikki forsvarligt, at nógv fólk liggja einsamøll og óhjálpin, eftir at heimahjálpin er farin seinastu ferð um kvøldið.

Ein døgnrøkt økir bæði um tryggleikan hjá tí, sum hevur hana fyri neyðini, eins og tað ber til at verða verðandi longri í egnum heimi, sigur Javnaðarflokkurin.

Hóast nógvar ábøtur skulu gerast á almannaøkinum, metir javnaðarflokkurin í nýggju valskrá síni, at pláss er fyri skatta- og avgjaldslætta til vanliga borgaran. Í valskránni verður skotið upp at lækka meirvirðisgjaldi úr teimum 25 prosentunum, tað er í dag, niður í 23 prosent.

Men tað, sum kanska mest fer at merkjast hjá pensionistunum, um valskrá Javnaðarfloksins verður veruleiki eftir eitt komandi val er, at flokkurin vil lækka frádráttarmarkið hjá pensionistum, soleiðis at teir kunnu vinna nakrar krónur eyka umframt pensiónina uttan at verða brandskattaðir av hesum.

## Fiskidagamarknaður

Um fiskivinnuna verður sagt, at javnaðarflokkurin tekur ikki undir við fullari umsetiligheit í fiskivinnuni. Ein fiskidagamarknaður eigur at verða settur á stovn, har handlað verður við fiskidøgum. Teir dagar, sum ikki verða brúktir, falla aftur til marknaðin.

Gongdina seinastu árini, har einstaklingar hava ríkað seg upp við sølu av fiski- og aliloyvum, sum teir hava fingið fyri einki frá tí almenna, góðtekur Javnaðarflokkurin als ikki. Hendan gongdin eigur at verða steðgað, og er fiskidagamarknaðurin júst eitt gott amboð til tess, verður sagt í valskránni.

Um almennu fyrisitingina verður sagt, at hon virkar ikki nóg væl í dag. Skipanin við nógvu aðalstýrunum skal broytast, so vit fáa eina miðfyrisiting, sum virkar meira sum ein samskipað heild, enn tað, vit síggja í dag.

At Javnaðarflokkurin ongantíð hevur tikið undir við fullveldispolitikkinum hjá sitandi samgongu, hevur flokkurin heldur ikki dult.

Mál floksins í tjóðskaparpolitikkinum er ein sjálvsstýrislóg, sum skal greiða viðurskifitini millum Føroyar og Danmark á ein virðiligan hátt, sum báðir partar kunnu góðtaka, stendur í valskránni.

Fíggjarligi parturin av sjálvsstýrislógini skal greiðast við, at lutfall verður sett millum vøksturin í tjóðarframleiðslu Føroya og eini minking í ríkisveitingini, sigur Føroya Javnaðarflokkur í nýggju valskránni, sum varð løgd fram á landsfundi floksins í Vestmanna um vikuskifti.

# Menn og javnstøða

**Møguleikar og forðingar hjá monnum at taka lut í arbeiðslívinum og familjulívinum eru á dagsskránni á spennandi ráðstevnu í oktober**

RÁÐSTEVNA
*Turið Kjølbro*

Síðst í komandi mánaði skipar Norðurlendska Instituttið fyri kvinnu- og kynsgransking fyri áhugaverdari ráðstevnu við heitinum “Menn kunnu - arbeiðslív og javnstøða”. Ætlanin við ráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn, er at lýsa møguleikar og forðingar hjá monnum í sambandi við arbeiðslív og javnstøðu. Ráðstevnan er ætlað politikarum, arbeiðstakarum, arbeiðsgevarum, embætismonnum og -kvinnum og granskarum í Norðurlondum. Høvuðsendamálið við ráðstevnuni er at kjakast um valmøguleikarnar hjá monnum, tá ið tað snýr seg um at sameina arbeiði og familju.

Lítið og einki hevur verið kjakast um menn og javnrættindi, heldur ikki, tá ið tað snýr seg um týdningarmesta partin í lívinum hjá flestu monnum, nevniliga arbeiðslívið. Í februar í ár góvu Norðurlendska Ráðharraráðið og Nordens Faglige Samorganistation í felag út ritið “Kunnu menn? Menn og javnrættindini í arbeiðslívinum”. Ritið er ætlað sum grundarlag undir viðgerðini av, hvussu myndugleikar, partarnir á arbeiðsmarknaðinum og gransking kunnu skipa og gjøgnumføra ítøkilig tiltøk, ið kunnu gera sítt til, at menn fáa gagn av einum virknum javnstøðupolitikki. Ráðstevnan í oktober fylgir tonkunum í ritinum upp.

Fyritreytin fyri einum virknum javnstøðupolitikki er, at menn gera sær greitt, hvørji ynski og hvønn tørv teir hava gjøgnum demokratiskar tilgongdir á arbeiðsplássinum, í politiskum flokkum, fakfeløgum, almennum kjaki og privatlívinum. Fyrireikararnir av ráðstevnuni vóna at menna politiska kjakið um menn, javnstøðu og arbeiðslív millum politikarar og partar á arbeiðsmarknaðinum fyri at vit kunnu fáa ein heildarkendan javnstøðupolitikk, sum er góður bæði fyri kvinnur og menn.

Ráðstevnan verður 28. okt. í Den Sorte Diamant í Keypmannahavn. Av áhugaverdum fyrilestrum kunnu vit nevna: “Ekstrema kynið - menninir í botninum, menninir í oddinum, og allir teir, sum fegnir vilja inn”. Tað er Anne Knudsen, blaðstjóri á Weekendavisen, sum heldur hendan fyrilesturin. Margreta Winberg, sum er landbúnaðar- og javnstøðumálaráðharri í Svøríki, heldur fyrilestur um “karrieru og familju, hvussu nýtímans familjan sameinar karrieru og børn”, og Árni M. Mathiesen, fiskimálaráðharri í Íslandi, tosar um: “virknu páparnar - eitt øðrvísi pápaloyvi í Íslandi”. Eisini verður pallborðsfundur við evninum “Møguleikar hjá monnum fyri at taka lut í familjulívi og arbeiðslívi”.

Norðurlendska Instituttið fyri kvinnu- og kynsgransking, stytt NIKK, verður fíggjað av Norðurlendska Ráðharraráðnum. Uppgávan hjá Instituttinum er at fremja, seta gongd á, samskipa og upplýsa um kvinnu- og kynsgransking í og uttan fyri Norðurlond. NIKK varð stovnað í 1995. Tað ber til at tekna seg til ráðstevnuna, sum er ókeypis, við at venda sær til NIKK.

